FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Føroyamálsdeildin

Tórshavn 5. Juli 2024

# VÆLKOMIN Á FØROYAMÁLSDEILDINA (FMD) Á FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Góði lesandi!

Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við, at tú ert tikin upp til útbúgvingina **Føroyskt** á Fróðskaparsetrinum. Vit vóna, at tú fært nøkur góð, lærurík, kveikjandi og mennandi ár her hjá okkum.

**Felags innleiðsla**

Felags innleiðsla fyri tey nýggju lesandi á øllum Setrinum verður

**mánadagin 19. august 2024 kl. 09.15 í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum á Vestaru bryggju**

Tú verður biðin um at møta í góðari tíð – einar 15 minuttir áðrenn. Eftir tiltakið í Kongshøll verður farið á Føroyamálsdeildina í V.U. Hammershaimbs gøtu 22. Sí vinaliga skránna fyri innleiðsludagin á Føroyamálsdeildini í endanum av hesum skrivi.

Umráðandi er at møta bæði til felags innleiðslutiltakið og innleiðslutiltakið á deildini, tí her verður viðkomandi kunning um týðandi viðurskifti fyri øll lesandi, m.a. um stuðulstænastur av ymsum slagi og um mannagongdir og kt-amboð, sum eru felags fyri øll á Setrinum.

**Innleiðsluskeið**

Fyrstu tvær vikurnar eru innleiðsluskeið. Serlig tímatalva er fyri tær báðar vikurnar.

**Skeið og lærubøkur heysthálvuna 2024**

Tímatalva fyri vanligu undirvísingina fyrstu lestrarhálvu er hjáløgd. Námsskipan kann lesast á hesum leinkjuni her

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma fyri í ætlanini. Um størri broytingar eru, verður kunnað um tað.

Vælkomin til eina spennandi útbúgving á Føroyamálsdeildini. Vit gleða okkum at síggja teg!

Vinarlig heilsan

Føroyamálsdeildin

Zakaris Svabo Hansen, útbúgvingarleiðari fyri føroyskt
t-postur: zakarish@setur.fo
fartlf. 292533

# Skrá fyri innleiðsluna á Føroyamálsdeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 | Skráseting |
| Kl. 09.15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.30 | Tónleikur |
| Kl. 09.45 | Stutt røða |
| Kl 10.00 | Lesandi fáa høvi at vitja básar. (Studni, Betri Banki, Landsbókasavnið, Rit og Rák, Ráð Teirra Lesandi, MFS og onnur verða boðin við) |

*Lesandi fara út á deildirnar.*

| | |
|---|---|
| Kl. 11.00 | Tit koma niðan á Føroyamálsdeildina, V.U. Hammershaimbs gøta 22 |
| Kl. 11.30 | Zakaris Svabo Hansen, útbúgvingarleiðari og varadekanur, bjóðar vælkomin |
| Kl 11.40 | Studentar og starvsfólk presentera seg fyri hvørjum øðrum |
| Kl 11.50 | Zakaris Svabo Hansen greiðir frá um lesturin, kunnar um lestrarráð o.a. |
| Kl. 12.10 | Felags myndatøka uttan fyri Føroyamálsdeildina |
| Kl. 12.25 | Føroyamálsdeildin bjóðar ábit |
| Kl. 13.00 | Bjarni Steintún: Um arbeiðsbyrðu og at lesa føroyskt á universitetsstigi |
| Kl. 13.20 | Útbúgvingarsamskiparin kunnar |
| Kl. 13.30 | Rundvísing á Føroyamálsdeildini |
| Kl. 14.00 | Fyrsti innleiðsludagurin liðugur |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

Ábit á **Føroyamálsdeildini** kl. 11-12.

Á **Føroyamálsdeildini** kl. 12-14: Zakaris Svabo Hansen: Snarskeið í føroyskari rættskriving.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Føroyamálsdeildin

**Mikudagin 21. august á Føroyamálsdeildini**

Dagur saman við mentorum. Um viðrar, verður útferð til Kirkjubøar kl. 9.00. Vit verða aftur í Havn umleið kl. 13 ella 14. Vit ganga um Kirkjubøreyn og koyra heimaftur. Um veðrið ikki er til vildar, verðir skipað fyri øðrum samansjóðandi tiltøkum.

**Hósdagin 22. august á Føroyamálsdeildini**

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00-11.00 | Jógvan í Lon Jacobsen og Bjarni Steintún: Málbroytingar. |
| Kl. 12.00-14.00 | Bergur Djurhuus Hansen og Iben Nyholm Debes: Hugvísindi. |

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 18.00 | Hittast á Føroyamálsdeildini til upphiting og hugna áðrenn SeturSamanShow. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |